

## Skrúðgonga, guðstænasta og tingfundur

Í meira enn 300 ár hava prestar hildið konvent á ólavsøku, og man hetta vera upprunin til ólavsøkuguðstænastuna, sum vit kenna hana í dag, har tey fólkavaldu – politikararnir - eisini taka lut.
Tað var ikki altíð, at tingið kom saman á ólavsøku – t.d. var einki løgting frá 1816 til 1852 - og viðhvørt er Tingið komið saman um heystið – men var tingfundur á ólavsøku, rann hetta saman við konventinum, og farið varð saman í kirkju.
Guðstænasta hevur tó verið hildin á ólavsøku, hóast eingin tingfundur var.
Í bókini »Færoæ & Færoa Reserata« frá 1673 skrivar Lucas Debes soleiðis um kvøldið, tá tingfundurin var liðugur, og fólk tóku sær av løttum í tingsalinum: »Gejstlige og Verdslige holde Gilde eller Gæstebud sammen, hvor udi de efter gammel Sædvane drikke Hans Kongl. Majest., Dronningens, Prinsens, Raadets, Lensherrens og andre fornemme Skaale med denne særdeles Ceremoni og Tale, som efterfølger: Først begynder en af de ældste Præster et Vers af en Salme, ... dernæst sjunger samme Præst alene dette på Latine efter gammel Stil, og samtlige Gæster svare paa Latine sangvis«.
Oldurmaðurin bað síðan øll reisa seg og »helle ad Munne, drikke, gøre vel, og ikke bjude dem som skænke førend vel er afdrukken, da den skal være Gud kierest, som mest drikker og mindst sparer ... Dermed staa de alle op og drikke hinanden til med Skaalen. Denne ceremoni bruges ved hver fornemme Skaal som drikkes. Naar saaledes enhver haver drukket efter sin Lyst, forføjer enhver sig hjem udi sit Lossement, og om anden dagen hjem til sit Hus, og se de hverandre ikke igen samtligen, førend om samme Aarstid igen«.

# Kirkjan yvirtikin á ólavsøku

**Í sambandi við at Fólkakirkjan verður yvirtikin, vitja fleiri norðurlendskir biskupar umframt danski kirkjumálaráðharrin í Føroyum á ólavsøku. Magnus Brahé Jørgensen, prestur, skal halda ólavsøkuprædikuna í ár, og hann gleðir seg til ta stóru løtuna**

**KIRKJA**

Theodor E. D. Olsen
theodor@sosialurin.fo

– Hetta verður ein stór løta.

Magnus Brahé Jørgensen, prestur í Norðoya vestara prestagjaldi, hevur fingið heiðurin at halda ólavsøkuprædikuna í ár, nú føroyingar yvirtaka kirkjuna sum málsøki.

Í hesum sambandi verða fleiri útlendskir gestir í Føroyum á ólavsøku. Umframt danska kirkjumálaráðharran, Bertel Haarder, ið ólavsøkudag skal undirskriva eina samstarvsavtalu við Mentamálaráðið, verða biskupar úr nógvum av norðurlondunum til staðar í Dómkirkjuni ólavsøkumorgun.

Tó verða eingi umboð úr danska kongshúsunum við.

Magnus Brahé Jørgensen sigur við Sosialin, at í sambandi við yvirtøkuna fer hann at viðgera fitt av kirkjusøgu í síni prædiku. Umframt at umrøða víkingatíðina, Sigmund Brestisson, katólsku tíðina og siðaskiftið, ætlar prestur eisini at nevna Pætur, sum tann klettin, kirkjan sambært evangeliunum eftir Matteusi og Jóhannesi skal byggja á.

### Teksturin setur tað andaliga høgt

Í sama broti í evangeliinum eftir Matteusi verður eisini sagt, at himmiríkisins lyklar verða givnir Pæturi, og hetta heldur prestur kann lesast sum, at vit liva eitt øðrvísi lív á jørð enn á himni.

Magnus Brahé Jørgensen vil sum vera man ikki fara í smálutir í prædikuni, áðrenn hann hevur hildið hana. Prestur hevur tó prædikutekstin at halda seg til, og í ár stendur hann í fyrru tekstarøð og er at finna hjá Matteusi evangelisti 12. kap. ørindi 24-27. Tekstirnir til ólavsøkudag eru stuttir, og hesin snýr seg um at avnokta seg sjálvan.

– Hann krevur at vit fylgja Jesusi, sigur klaksvíkarprestur, sum metir, at teksturin gevur okkum Jesus sum fyrimynd.

– Teksturin niðurtónar tað materiella og setur tað andaliga høgt, sigur Magnus Brahé Jørgensen, ið eisini gleðir seg at at prædika í Havnar kirkju, har hann sjálvur var kirkjutænari í nógv ár.

### Yvirtøkan hátíðarhildin

Ólavsøkan í ár verður eisini tann seinasta hjá Hans Jacob Joensen sum Føroya biskupi. Sjálvur væntar hann ikki aðrar broytingar, nú kirkjan verður yvirtikin, enn at tað nú verða føroyingar sjálvir, sum rinda fyri kirkjuna.

Hann viðgongur tó, at tað er við sorgblídni, at hann fyri síðstu ferð tekur lut í ólavsøkuskrúðgonguni sum bispur.

– Ja, men nú havi eg verið bispur í 17 ár, og tað hava sum heild verið útmerkað ár, sigur Hans Jacob Joensen.

Vanligt hevur verið, at prestar eftir ólavsøkuguðstænastuna hittast hjá bispi til ein betri bita. Men sambært skránni hjá Mentamálaráðnum fyri teir innbodnu gestirnar sær ólavsøkudagur øðrvísi út í ár enn undanfarin ár, nú yvirtøkan verður staðfest.

Eftir guðstænastu, skrúðgongu, tingfund og løgmansrøðu, verða gestirnir bodnir til ein kaffimunn hjá bispi kl. 14.

Ein tíma seinni á nóni undirskriva Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, og Bertel Haarder samstarvsavtaluna á almennum tiltaki í Norðurlandahúsinum, har kórsangur og fyrilestrar eisini verða á skránni.

Ein av fyrilestrahaldarunum er Jákup Reinert Hansen, sum fer at røða um føroyskt kirkjumál. Sjálvur sigur hann, at talan verður um ein fólksligan og lættari fyrilestur, ið fer at vara umleið eitt korter, og sum m.a. fer at vísa á ta føroysku kirkjusøguna.

Klokkan 18 er Mentamálaráðið vertur fyri einum døgurða fyri innbodnum í nýggja bygninginum hjá Føroya Tele í Hoyvík.

### Skrá fyri hátíðarhaldið ólavsøkudag í Norðurlandahúsinum í sambandi við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni

14.50-15.00 Aldubáran
15.00-15.15 Undirskriving av samstarvsavtaluni millum Mentamálaráðið og danska kirkjumálaráðið. Jógvan av Lakjuni, landsstýrismaður í kirkjumálum og Bertel Haarder, kirkjumálaráðharri, flyta fram røður
Kór Glyvra kirkju við Meinhardi Bjartalíð
Fyrilestur við Jákupi Reinert Hansen, sóknarpresti (føroyska málið og føroyska kirkjan)
15.45-15.55 Kingobólkurin úr Tjørnuvík
15.55-16.10 Fyrilestur við Jógvani Fríðrikssyni, sóknarpresti (sjómaðurin og kirkjan)
16.10-16.20 Aldubáran
Fyrilestur við Hans Jacob Joensen, bispi (bíbliutýðingar o.a.)
Kingobólkurin úr Tjørnuvík